Jóna Gunnarsson

# Í CHILE

Juni/juli/august 2011

## Takk mín Gud

Øll góð gáva og øll fullkomin gáva er omanfrá og kemur niður frá Faðir ljósanna, sum ikki er broyting ella skiftandi skuggi hjá.
- Jákup 1:17

**…Til hetta kann eg bert siga AMEN…**



## Mín feria: Ein túrur til Bolivia…

Hey øll somul. Vónandi hava tit tað gott og hava notið summarið í Føroyum – her hava vit havt vetur inntil nú ☺ Eg vil byrja við at siga eitt sindur frá mínari feriu, sum var eitt heilt fantastiskt upplivilsi fyri meg. Eg havi 2 vikur feriu um árið, sum skulu haldast í juni, og í hesum sambandi kom ein vininda frá Onglandi at vitja meg í juni. Emma og eg deildu kamar í 9 mðr. her í Chile, so eg var sera spent at síggja hana aftur. Saman hava vit eina vinindu, sum arbeiður í einum barnaheimi í jungluni í Bolivia, so vit gjørdu av at fara at vitja hana. Fyrst fóru vit til býin la Paz, sum liggur 3.650m yvir havyvirflatuni, og harvið er heimsins hægstliggjandi høvuðsstaðar. Har vóru vit teir fyrstu fýra dagarnar og upplivdu mangt og hvat. M.a. feiðraðu vit Aymara nýttárið í einari lítlari bygd, sum eitur Tiwanaku – ár 5520! Harafturat upplivdu vit fjallasúkling í 'The Death Road', har vit byrjaðu í 4.700m hædd, og aftaná vit høvdu súklað 5 tímar, vóru vit einans 1.180m yvir havyvirflatuni – orð kunnu ikki siga frá vakurleikanum, sum vit sóu har og í hinum støðunum í Bolivia. Síðan fóru vit til jungluna – og inn í hitan! Sjálvt aftaná allar tær heilt fantastisku upplivingarnar sum vit høvdu í la Paz, var tíðin í jungluni heilt sikkurt hæddarpunktið á túrinum. Vit vóru sera væl móttiknar á barnaheiminum, og hetta var einans byrjanin uppá nakrar dagar, sum veruliga settu seg í mítt hjarta. Barneheimið eitur 'Casa de Esperanza', sum merkir Vónarhús, og var byrjað av nøkrum hollendskum trúboðarum saman við einari samkomu har á staðnum. Staðið er sum eitt paradís fyri tey 90 børnini, sum øll koma frá hjartabrótandi umstøðum – nøkur funnin í ruskspannum, onnur seld av sínum foreldrum, og aðrar óhugsandi søgur fingu vit at hoyra um. Har sleppa tey øll í skúla, hoyra um Jesus hvønn dag, og uppliva Guds kærleika og góðsku m.a. frá teimum sum arbeiða har. Tíðin hjá okkum fór við at spæla við børnini, læra tey sangir, hjálpa við heimaarbeiðinum og onnur stuttlig ting. Eg eri so rørd og signað at hava upplivað hetta staðið, har børnini eru trygg og elskaði. Fyri meg var tað eitt bønarsvar til bønina: "…komi ríki Títt…"



**Caranavi, Bolivia**
Ein genta á barnaheiminum í Bolivia. Ein seinnapart setti eg saman við henni at hjálpa henni við heimaarbeiðinum í enskum.



**'Casa de Esperanza' í jungluni**
Her standa vit saman við okkara vinindu Sheridyn á økinum har sum barnaheimið er. Her búgva uml. 90 børn í aldrinum 0-18 ár og uml. 20 vaksin sum arbeiða har.




# Jóna Gunnarsson

**OM Chile, p/o box 534-3**
**Santiago Centro, Chile**
**jona_89@hotmail.com**


## Heimasíður hjá OM:

www.om.fo
www.omchile.cl
www.news.om.org

## Stuðul:

Konta hjá OM í Eik: 9181-426.219.2 og viðmerk 'Jóna Gunnarsson'

## Biðið fyri…

…Barnaheiminum í Bolivia

…Teimum frá Chile, sum eru farin til onnur lond at arbeiða við OM og tí nýggja venjingarliðinum sum byrjaði her í sep.

…Arbeiðinum í barnaheiminum og á gøtuni – serliga fyri Hugo og Pamelu.

…Mínari heilsu.

…Vísdóm og leiðslu til mín og Israel (tann fitti sjeikurin á myndini omanfyri )

## Takkið Gudi fyri…

…Guds undurfulla skapanarverk!

…Israel og ta signing hann er í mínum lívi.

…Allan tann stuðulin eg havi móttikið hendan veturin – bønir, peninga-gávir og heilsanir.

…ta fantastisku tíðina eg hevði í Bolivia.

…Framgongd í tænastunum.

…At eg eri frisk og at várið er byrjað.

…eina fantastiska familju, góðar vinir og samkomu sum Gud hevur signað meg við í Føroyum.

# Mín vetur í Chile

Fyri at lýsa eitt sindur hvussu veturin hevur verið í ár, so er broytingar tað fyrsta eg vildi nevnt. Eftir at hava arbeitt í 9 mrð. við 8 fantastiskum ungum fólkum frá ymsa staðni í Europa, fóru tey øll av landinum ta fyrstu vikuna í juni. Sama dag sum tey fóru av landinum komu 5 chilenar (tveir dreingir og tríggjar gentir) til okkum at búgva í 2-3 mðr. áðrenn teir fóru víðari til eitt annað land har teir skulu arbeiða við OM tey næstu tvey árini. Londini sum tey fóru til eru: Mozambique, India, Spania, Bosnia og ein fór umborð á Logos Hope. So tað var sera spennandi at vera við til fyrireikingarnar hjá teimum og at sleppa at lána tey til okkara tænastur inntil tey fóru av landinum. Harafturat vóru nógv av liðinum hjá okkum í farloyvi, so í juni, juli og august vóru næstan bara chilenar og suðuramerikanar sum arbeiddu her í OM Chile. Hetta hevur verið ein sera góð uppliving fyri meg, sum eg havi notið sera nógv - samverðuna, at gera døgurða saman, møtast fyri at hyggja eftir fótbólti o.ø. So hóast veturin var seeera kaldur megnaði tann suðuramerikanska mentanin at hita dagligdagin væl upp ☺ Í septembur kom tað nýggja útlandska venjingarliðið, og harvið byrjaði ein nýggj avbjóðing hesar komandi 8 mðr.

Arbeiðið á barnaheiminum er eisini nógv merkt av broytingunum. Við tí chilenska holdinum sum arbeiddi við mær hendan veturin, vóru minni avbjóðingar við málinum, mentanini o.s.fr. og harafturat høvdu nøkur av teimum nógvar royndir við barnaarbeiði, og tí var tað møguligt at veruliga taka hond um nakrar av trupulleikunum sum vit síggja ímillum børnini, so sum happing. Arbeiðið við teimum heimleysu hevur eisini havt nógva framgongd, og nú vitja vit tey heimleysu í tveimum pørtum í Santiago ístaðin fyri bara tað eina staðið har vit hava arbeitt tey seinastu árini. Eg kann eisini líka nevna at Hugo, sum er tann heimleysið sum byrjaði at koma í mína samkomu er nú dottin í aftur alkoholið, so honum tørvar nógv okkara bønir. Harafturat er Pamela, ein av okkara vinfólkum frá gøtuni, sum vit hava kent í 3 ár, endað í fongslinum, so hvønn mikudag vitja eg og tvey onnur hana har – Gud ger stór ting í hennara lívi.

Hetta hevur verið ein góð tíð við nógvum góðum broytingum, men samstundis merktu aðrar avbjóðingar hesa tiðina. Eg var sjúk næstan allan veturin, og hóast eg vitjaði læknan nakrar ferðir og fekk bæði anti biotica og nógvan annan heilivág at taka, tók tað langa tíð at koma fyri meg aftur. Eg kann viðganga, at hetta hevur ikki verið tann lættasta tíðin, og mínir tankar leitaðu sær ofta til heimlands oyggjarnar, men nú eri eg frísk og várið er byrjað ☺ Takk fyri allar tykkara bønir og stuðul. Eg takki Gudi fyri tykkum! Og ein heilt serlig heilsan til mítt 'Friðarheim' Lívdin – Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum, tit hava eitt heilt serligt pláss í mínum hjarta. Harrin signi tykkum øll ríkliga.





